# Øktur føroyskur frøðinevnalisti

## Extended List of Nomenclature in Faroese

*Jens-Kjeld Jensen and Marjun Arge Simonsen*

Føroya Náttúrugripasavn, FO-100 Tórshavn, Faroe Islands.
Emails: jkjensen@post.olivant.fo; marjuns@kallnet.fo

Stig vórðu á heysti 2002 tikin til at bøta um føroyska frøðinevnalistan, tí vit mettu, at tað var neyðugt at fáa hann øktan, so til bar at fáa eitt neyvari uppbýti, tá ið djór ella plantur skuldu staðsetast frøðiliga.

R. Rasmussen nýtti longu í *Plantulæruni* (1910) hetta uppbýti: *fylki*, *flokkur*, *hópur*, *ætt*, *slekt* og *slag*. Hesin listi hevur síðan verið nýttur, eitt nú í *Føroyskari orðabók* (1998), ið bólkar plantur og djór í *ætt*, *slekt* og *slag* (sí *Nýtsluleiðbeining* á bls. 17). Summar lærubøkur hava nýtt onnur frøðinevni, eitt nú í sambandi við djórafrøði. Á 15. altjóða plantufrøðiligu ráðstevnuni í 1993 (sí *Biology of Plants*, 1999: 264) varð samtykt at nýta somu frøðinevni fyri plantur og djór. Tískil er ikki longur neyðugt at hava tveir ymsar frøðinevnalistar.

Tó er stundum neyðugt við fleiri millumstigum, so møguligt er at áseta eina neyvari taksonomi. Sum kunnugt finst ein nógv longri og meiri útgreinaður listi á enskum (sí t.d. *Classification of Mammals. Above the Species Level*, 1998: 20), men vit avgjørdu at avmarka okkum til at byggja føroyska listan út við at leggja *sub-* og *super-* heitini afturat.

Fyrsta uppskotið varð sent 18 lívfrøðingum og lívfrøðiáhugaðum, 2 málfrøðingum og Málstovuni. Viðmerkingar komu inn, og nógv samskifti og kjak varð, og einstøk frøðinevni vórðu broytt. Fyri at røkka hesum máli, t.e. at fáa ein lista, sum øll kundu vera nøgd við, var neyðugt, at øll, sum umboðaðu tey ymsu frøðiøkini, slakaðu eitt sindur. Tó var semja um ikki at broyta tey heitini, ið eru í listanum hjá R. Rasmussen, tí hann hevur verið so leingi í gildi, at hann varð mettur at hava vunnið hevd. Men neyðugt hevur verið at sleppa eitt nú *grein* og *deild*, ið hava verið nýtt í einstøkum læru- og frøðibókum. Endaligi listin er hesin:

| | | |
|---|---|---|
| **ríki** | *(regnum)* | en. kingdom |
| **fylki** | *(phylum)* | en. phylum |
| **undirfylki** | *(subphylum)* | en. subphylum |
| **flokkur** | *(classis)* | en. class |
| **undirflokkur** | *(subclassis)* | en. subclass |
| **yvirhópur** | *(superordo)* | en. superorder |
| **hópur** | *(ordo)* | en. order |
| **undirhópur** | *(subordo)* | en. suborder |
| **yvirætt** | *(superfamilia)* | en. superfamily |
| **ætt** | *(familia)* | en. family |
| **undirætt** | *(subfamilia)* | en. subfamily |
| **slektbólkur** | *(tribus)* | en. tribe |
| **undirslektbólkur** | *(subtribus)* | en. subtribe |
| **slekt** | *(genus)* | en. genus |
| **undirslekt** | *(subgenus)* | en. subgenus |
| **slag** | *(species)* | en. species |
| **undirslag** | *(subspecies)* | en. subspecies |

## Tøkk

Vit takka teimum, sum hava verið við í kjakinum og sum eru komin við góðum frøðiligum viðmerkingum, t.e. Dorete Bloch, Eilifi Gaard, Dánjal Peturi Højgaard, Tróndi Leivssyni, Eyðfinni Magnussen, Abrahami Mikladal, Bergi Olsen, Johannesi Danielsen og Jákupi Reinert.

Vit takka Jóhan Hendriki W. Poulsen fyri holla málsliga vegleiðing til frøðiheitini. Harumframt takka vit Mariusi Staksberg og Føroysku Málnevndini við formanni.

## Heimildir:

McKenna, M.C. og Bell, S.K. 1998. *Classification of Mammals. Above the Species Level*. New York

Poulsen, J.H.W., Simonsen, M., Jacobsen, J. í L., Johansen, A. og Hansen, Z.S. (ritstj.). 1998. *Føroysk orðabók*. Tórshavn.

Rasmussen, R. 1910. *Plantulæran*. Tórshavn

Raven, P.H., Evert, R.F og Eichhorn, S.E. 1999. *Biology of Plants*. (Sixth Edition). New York